e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

## Klaksvíkingar eru øgiliga svangir

*Hjá B68 er tað ivasamt, um Fróði Benjaminsen verður førur fyri at spæla í Klaksvík*

Nú skal tað vera, um nakrar hugsningur skal vera um at vera við, har tað er hugaligt at kappast. Hetta eru fótbóltshugaðu klaksvíkingarnir samdir um undan B68 vitjanini.

Mikukvøldið vandu nýggju jugoslavarnir fyri fyrstu ferð, og vit skilja á lagnum, at ætlanin er, at 32 ára gamli Zoltan Kujundzic skal verja málið móti B68, og at 22 ára gamli Srecko Milicevic verður í álopinum.

Um jugoslavarnir verða við, so verður liðið broytt, sammett við tað, sum spældi málleysan javnleik í Gøtu. Tað er eisini greitt, at aðrir spælarar, sum ikki vóru við í Gøtu, verða við móti B68. Harley Bertholdsen var sjúkur, og Marek Wierczbicki var í Póllandi. Teir eru báðir komnir afturíaftur og eru sjálvskrivaðir á liðnum.

Spurningurin er so, hvørjar spælarar Sivic velur at seta á beinkin. Tað er ein sannroynd, at blaðungu menninir – t.d. Kristian á Lakjuni – hava roynst væl, meðan onkrir av teimum, sum vóru við til at vinna FM og steyp í fjør, og sum tað hevur verið roknað nógv við í ár, ikki enn hava verið sannførandi.

John Ryan hevur verið skaddur í fleiri vikur. Hann hevur vant í hesi vikuni.

### Liðformaðurin ivasamur

Hjá B68 bendir nógv á, at Jan Petersen, sum í fleiri vikur hevur verið burtur frá við brákaðum rivjabeini, verður við aftur móti KÍ. Fyrrapartin av vikuni vandi hann fyri seg sjálvan, men á Toftum mettu teir tað vera hampuliga góður møguleiki fyri, at Jan verður førur fyri at spæla, og tað verður Eyðstein Skipanes, sum hevur verið skaddur, eisini.

Klaksvíkstúrurin hjá B68 er hin fyrsti, síðani fyrrverandi KÍ venjarin, Jóannes Jakobsen, gjørdist venjari á Toftum. Jóannesi dámdi væl í Klaksvík, og klaksvíkingar hildu nógv av honum. Vinskapurin verður ikki settur upp á spæl, men dýra biðjudag verða teir mótstøðumenn.

Hjá Jóannesi Jakobsen og B68 kemur tað stak illa við, um landsliðsmaðurin og liðformaðurin Fróði Benjaminsen ikki verður førur fyri at spæla. Hann hevur í vikuni verið so mikið plágaður av einum knæskaða, at hann hevur ikki fingið vant, og í hósdagin ivaðust teir á Toftum stórliga í, um hann verður tøkur í morgin.

Í fjør tapti B68 tvær ferðir 5–0 í Klaksvík – bæði í steypakappingini og landskappingini.B68 fekk síðsta stigið í Klaksvík í 1997, tá úrslitið var 2–2. B68 hevur ofta megnað javnleik í Klaksvík, men teir hava ikki vunnið síðani 1988, tá úrslitið var 0–2.

JH



*Í Klaksvík vóna tey, at Srecko Milicevic fer at gera um seg beinanvegin*

**Mynd: JH**

## Við rygginum móti múrinum

*Sumbingar eru sera illa sperdir undan dystinum dýra biðjudag, har tap vørir við sær, at teir verða púra einsamallir í botninum*

JÁKUP MØRK

Í løtuni stendur einki til hjá sumbingum, sum triðja árið á rað royna seg í bestu deildini. Støðan á stigatalvuni, har teir eru niðastir við ongum stigið, er alt annað enn hugalig, og harumframt eru fleiri av berandi kreftunum í løtuni uttanfyri hópin, orsakað av skaðum.

Seinasta vikuskiftið vórðu teir rætt og slætt avbukaðir, og tí er týdningarmesta uppgávan hjá Milan Cimburivic helst at geva monnum sínum nakað av sjálvsáliti aftur.

Venjarin ásannar tó, at talan verður um eina sera truppla uppgávu fríggjadagin. Tá vit færttu, vóru fleiri leikarar mettir sum verandi rættuliga ivasamir, og tað varð ikki fyrr enn í gjárkvøldið, at avgerð skuldi takast, hvørt hesir skuldu spæla við ella ikki.

Umframt Baja og Páll Magnar, sum eru langtíðarskaddir, eru fýra aðrir leikarar, sum ikki hava vant í vikuni. Bergur Vinther noyddist út við skaða móti B36 seinast, meðan Eirikur Joensen als ikki var við ta ferðina. Harumframt er jugoslaviski Bibi hálvskaddir, meðan René Thomsen hevur ligið sjúkur í vikuni.

Milan sigur tó, at teir ellivu leikararnir, sum fara á vøllin fríggjadagin fara at berjast sum úlvar á skóg fyri at fáa fatur á stigunum. - Komandi dystirnir verða ógvuliga týdningarmiklir hjá okkum. Tapa vit komandi heimadystirnar móti FS Vágum og B71, verða vit fullkomuliga einsamallir í botninum, og tá verður tað ógvuliga trupult hjá okkum at koma aftur íaftur, eru boðini frá venjaranum.

### Ómóðir vágamenn

Vágamenn ásanna eisini, at talan kann gerast um eina rættuliga trupla uppgávu á Krossinum, fríggjadagin. - Teir hava so at siga ryggin móti múrinum, og slík lið eru aloftast torfør at hava við at gera, tí skipað fótbóltsspæl verður ofta sett aftur um stríðsvilja tá so er, sigur Páll Olsen, sum er hjálparvenjari hjá vágaliðnum.

Páll vónar tó, at dygdrnar hjá teimum, fara at viga meira enn stríðsviljin hjá sumbingum, og harumframt leggur hann áherslu á, at FS Vágar eisini noyðist at vinna sær nøkur stig, áðrenn gloppið uppeftir gerst alt ov stórt.

Vágamenn høvdu, orsakað av vanlukkuni har vesturi, frí undanfarna vikuskiftið, og líkt er til, at allir mans eru tøkir til týdningarmiklu uppgávuna.

Dysturin millum FS Vágar og HB, sum skuldi verið leiktur sunnudagin, er nú ásettur at verða 7. juni. Um so er, at bæði HB og FS Vágar mugu lúta í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, verður dysturin tó helst fluttur til 1. juni.

## VB ætlar sær at vinna

*HB hevur virðing fyri vágbingum, sum ikki halda seg hava manning til verjukent spæl*

Vágbingar hava ikki tapt í teimum báðum landskappingardystunum á útivølli – teir vunnu í Sumba og spældu javnt í Klaksvík – og tá teir far í Gundadal at spæla móti HB, er tað við tí í huganum, at teir skulu fáa øll stigini:

– Í útgangsstøðuni skal liðið, sum eg havi ábyrgdina av, altíð leypa á, og eg haldi, at VB liðið í ár, hevur so framrættaðar dygdir, at tað er týdningarmikið hjá okkum at fáa spælið at ganga fyri seg í okkara álopsparti.

Tað sigur VB venjarin, Krzysxtof Popczynski, sum hevur allar spælararnar tøkar til havnarferðina. VB hevur ofta staðið seg væl í Gundadali móti HB, men teir hava ikki fingið stig síðani 1997, tá teir vunnu 2–1.

At VB fleiri ferðir hevur havt takið á HB í Gundadali, kann liðformaðurin hjá HB, Rúni Nolsøe, skriva undir uppá. Áðrenn hann í 1993 fór at spæla við HB, var hann fleiri ferðir við til at vinna í Gundadali.

– Eg minnist serliga væl, tá vit í 1989 vunnu 4–0, og í 1991 haldi eg, at vit vunnu 2–1.

Rúni Nolsøe hevur ikki sæð besta liðið hjá barndómsfelagnum spæla í ár, men út frá manningini ivast hann ikki í, at teir hava eitt gott lið:

– Vit hava virðing fyri teimum, men sjálvandi er tað týdningarmikið hjá okkum at fáa trý stig á heimavølli. Vit eru við at spæla eitt nýtt lið saman, og higartil hevur tað gingið hampuliga væl.

HB hevði frí síðsta vikuskifti. Bárður Mortansson og rumenski miðvallarin Gigi eru komnir fyri seg aftur, meðan Jón Rói Jacobsen framvegis er skaddur.

JH


*VB venjarin leggur seg eftir at spæla álopsfótbólt*

## Dystirnir um vikuskiftið

**1. deild menn, 5. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 19.05 | Sumba-FS Vágar | Jens Petur Brattalíð |
| 19.05 | KÍ-B68 | Oddmar Andreasen |
| 19.05 | B71-B36 | Suni Johansen |
| 19.05 | NSÍ-GÍ | Lassin Isaksen |
| 19.05 | HB-VB | Birgir Sondum |

**2. deild menn, 4. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 20.05 | TB-HB | Eiler Rasmussen |
| 20.05 | GÍ-NSÍ | Kim Ejdesgaard |
| 20.05 | B36-ÍF | Arni Gunnarsson |
| 20.05 | Royn-KÍ | Regin Egholm |
| 20.05 | LÍF-EB/Streymur | Tummar Pauli Olsen |

**3. deild menn, 5. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 19.05 | TB-FS Vágar | Zoran Mancic |
| 19.05 | KÍ-B68 | Petur Hansen |
| 19.05 | B71-B36 | Lars Müller |
| 19.05 | Skála-ÍF | Aron Olsen |
| 19.05 | AB-VB | Tommy O. Joensen |
| 21.05 | FS Vágar-AB | Útsettur frá 4. umfari |

**Kvinnudeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 19.05 | Sumba-HB | Frits Poulsen |
| 19.05 | AB-VB | Pætur Clementsen |
| 19.05 | GÍ-Skála | Jonhard Hansen |
| 19.05 | EB/Streymur-KÍ | Edvard Højgaard |
| 19.05 | B36-NSÍ | Ransin N. Djurhuus |

**Kappingin um Løgmanssteypið**

| | | |
|---|---|---|
| 21.05 | B36-HB | Jens P. Brattalíð |
| 21.05 | B68-VB | Petur Reinert |
| 21.05 | GÍ-NSÍ | Oddmar Andreasen |
| 21.05 | KÍ-FS Vágar | Birgir Sondum |



## Skerd árstalsfeløg hittast

*B36 skal royna seg uttan John Petersen, og harumframt eru fleiri stuðulsleikarar á báðum liðum rættuliga ivasamir*

JÁKUP MØRK

Tá besta mansliðið hjá B36 fríggjamorgunin fer til Sands, mugu teir eftir øllum at døma vera minst tveir av teimum leikarum, sum farna vikuskiftið vóru við í stórsigrinum á Sumba.

Annar er sjálvandi John Petersen, sum mikudagin setti undirskrift sína á sáttmálan við Leiftur. Í dystinum móti Sumba røkti John ikki vanliga álopssess, men var ístaðin fluttur oman á miðvøllin. Fyri hann royndi B36 seg við Bjarna Prior í álopinum, við fýra málum sum úrslit, men tað tykist eisini ógvuliga ivasamt, um Bjarni verður við móti sandoyingum. Hann hevur seinastu vikurnar drigist við ein skaða í rivjabeinunum, og nú er líkt til, at hetta eisini hevur havt aðrar skaðar við sær.

Umframt hesar báðar, so noyðist B36 enn einaferð at vera landsliðsleikaran, Jens Kristian Hansen, fyri uttan. Hann hevur ein skaða í búkinum, sum stavar frá tíðini hjá Ayr United í Skotlandi. Harumframt hava bæði Egil Zahariasen og Mikkjal Thomassen vant lítið í vikuni, men mikukvøldið varð roknað fyri vist, at teir báðir verða við á liðnum.

Pelle Andersson, venjari hjá B36, sigur seg tó ikki kunna brúka hetta til so nógv. - Eg má bara hugsa um teir leikarar, sum eg havi tøkar, og so fáa tað besta úr teimum. Tað nyttar okkum einki, um vit nýta fráveru og miss av leikarum sum umbering fyri at spæla illa, tí tað er týdningarmikið hjá okkum at fáa fulla úrtøku úr dystinum, sigur venjarin, og leggur samstundis áherslu á, at tað er í slíkum støðum, at týdningurin av einum breiðum hópi kemur til sjóndar.

### B71 eisini skert

Heimaliðið er tó eisini nakað skert, nú teir fáa vitjan av oddaliðnum, og mikukvøldið var ivamál um fleiri av stuðulsleikarunum á liðnum.

Rúni í Soylu noyddist av vøllinum, tá B71 sunnudgin spældu á Toftum, og hann verður í hvussu so er ikki tøkur, siga tey av Sandi. Harumframt tykjast bæði Julian Florescu og Alex Nielsen at vera ivasamir. Báðir hava teir skaðar í fótinum, sum teir fingu móti GÍ fyri nærum tveimum vikum síðani, men kortini vóru teir báðir á vølli móti B36. Spurningurin er so, um teir enn einaferð kunnu pjøssast saman.

Vónirnar hjá Sandoyingum eru annars góðar undan dystinum. Á Svangaskarði gekk heilt væl, fram til skaðar og eftirfylgjandi útskiftingar høvdu við sær, at sonevnda rútman á liðnum varð brotin.

Kunnu teir finna sama spælið fram móti B36, verður talan uttan iva um ein truplan dyst fyri heimaliðið. Hagtølini tala eisini fyri, at so verður. Dystirnir millum B36 og B71 hava vanliga verið sera tættir, við 1997 sum undantaki tá B36 vann at kalla stórsigur.


*Jan Guttesen, noyðist helst at finna sær nýggjan miðvallarfelaga, tá B36 fríggjadagin skal til Sands*

## Pól aftur í Føroyum

*Ein av lyklaspælarunum hjá NSÍ er leikbannaður og ivi er um onkran annan*


*Frá dystinum, NSÍ-GÍ, í fjør. Helgi L. Petersen skal nú royna seg í øvugta leiklutinum móti gomlu liðfeløgunum*

NSÍ smokkaði eitt sindur, tá teir taptu í Vági. Tríggir lyklaspælarar noyddust út síðsta korterið í Vági, og tað tók dygt. Ian Højgaard, Gert Langgaard og Djóni N. Joensen eru allir komnir fyri seg aftur.

Tað er greitt, at góði bóltspælarin í vinstru, Sjúrður Jacobsen, ikki verður við. Hann er leikbannaður eftir reyða kortið í Vági. Arnfinn Langgaard fekk ein løst undir venjingini mikukvøldið, og í gjár var eitt sindur ivasamt, um hann verður við, tá GÍ vitjar dýra biðjudag.

Hjá gøtumonnum stendur betri til við fólki, enn tað hevur gjørt leingi. Pól Ennigarð kom úr Danmark at hjálpa til móti KÍ, og ætlanin er, at hann í vikuskiftinum skal vera við í báðum dystunum móti NSÍ – í landskappingardystinum á útivølli dýra biðjudag, og í fjórðingsfinaluni í steypakappingini á heimavølli sunnudagin.

Ivamálið hjá GÍ er Súni Olsen. Hann fekk ein snudd í knæið, tá GÍ 7. mai spældi á Sandi, og síðani tá hevur hann einki spælt. Í hesi vikuni hevur Súni runnið eitt sindur, men hann hevur ikki vant saman við hinum, og hósdagin var tað lítið sannlíkt, at hann verður við í Runavík.

Avrikið móti KÍ kundi bent á, at Johan Nielsen fór at umhugsa at gera onkrar broytingar. Ein møguleiki er, at Henning Jarnskor verður fluttur longri fram á vøllin, og at Áslakur R. Petersen, sum móti KÍ var á beinkinum, sleppur upp í part beinanvegin.

GÍ hevur ikki vunnið landskappingardyst í Runavík síðani í 1995. Tá var úrslitið 0–1. Í 1996 var NSÍ í 2. deild, í 1997 var 2–2, í 1998 vann NSÍ 3–1, og í fjør endaði tað 1–1.

JH

## Todi hevur brotið fingurin

*Men føroyski álopsmaðurin verður í álopinum, tá FCK sunnudagin fer at royna at syfta Brøndby*

Todi Jónsson gongur við brotnum høgra longutong. Føroyski álopsmaðurin í FCK vandi fyrstu ferð í hesi vikuni saman við liðfeløgunum mikudagin. Mánadagin og týsdagin vandi hann uttan bólt, meðan liðfelagarnir í góðveðrinum spældu við bóltinum.

Hóast longutong er brotin, so verður Todi Jónsson við, tá FCK sunnudagin fer út í Brøndby, har tað langt síðani er útselt til nýklassikarin:

– Eg havi fingið ein skinnara at hava á fingrinum. Teir, sum hava skil fyri tí, siga, at tað ber væl til at spæla við fingrinum í skinnara, og eg vil ógvuliga fegin spæla við í hesum dystinum, sigur Todi Jónsson, sum sunnudagin skoraði fyrsta málið í landskappingini í ár 2000.

– Eg haldi avgjørt, at vit hava ein møguleika at vinna í Brøndby, men tað verður torført. Brøndby roynist betri á heimavølli, enn teir gera á útivølli, og teir eru greiðir yvir, at skulu teir framvegis hava møguleika at vinna DM, so skulu teir hava trý stig móti okkum.

Todi spældi í ein hálvan tíma í Viborg við brotnum fingri:

– Eg varð feldur av einum, og í fallinum royndi eg at lofta mær. Fingurin tók fyrst, og hann brotnaði. Eg hevði nógva pínu, men tað kendist frágera gott at skora, sjálvt um fingurin var brotin. Men at vit ikki fingu øll trý stigini líktist púrasta ongum. Vit høvdu upplagdar møguleikar at skora í hvussu so er tvey ella trý mál.

### Nógv pressa

Í Herfølge gongur lívið so nógv sína vanligu gongd, sum tað ber til, tá gulldeymurin er so sterkur, sum støðutalvan boðar frá, at hann er, nú tað resta trý umfør av donsku kappingini.

Jákup Mikkelsen hevur vant hvønn dag í hesi vikuni:

– Nógv pressufólk hava vitjað undir venjing hesa seinastu tíðina, bæði danskarar og útlendingar. Tey eru serliga áhugað at tosa við John Faxe Jensen, og hann sigur teimum tað sama, sum vit allir hava fremst í huganum.

*Hvat er tað?*

– At tað, sum nú ræður um, er at vinna móti OB sunnudagin. Um vit fáa trý stig hava vit góðan møguleika at røkka DM. Um vit tapa, er tað góður møguleiki fyri, at vit sunnukvøldið eru næstfremst og ikki fremst. So einfalt er tað, og tí mugu vit fáa trý stig, staðfestir ein jarðbundin Jákup Mikkelsen.

JH

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 23 | 4 | 19 | 12 |
| 2 | B68 | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 10 | 5 | 5 | 9 |
| 3 | VB | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 4 | HB | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 7 |
| 5 | GÍ | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 5 | 5 | 0 | 5 |
| 6 | NSÍ | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 6 | 7 | -1 | 5 |
| 7 | B71 | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 8 | KÍ | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 2 | 4 | -2 | 2 |
| 9 | FS Vágar | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 4 | 11 | -7 | 1 |
| 10 | Sumba | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 3 | 19 | -16 | 0 |